Vestmanna kommuna
Bakkavegur 8 · FO-350 Vestmanna

Tlf. 770 100
vestmanna@vestmanna.fo
www.vestmanna.fo

Útbjóðingarskriv

# Á Bakka

## Útboð av lendi til bústaðarbygging í Vestmanna

Vísandi til kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn lýsir Vestmanna kommuna við hesum lendi á Bakka til sølu at brúka til bústaðarbygging.

Talan er um matr. 68b og ein ásettan lut av matr. 36c.

Økið er lagt út sum A2 – miðstaðarøki í byggisamtyktini hjá Vestmanna kommunu (sí fylgiskjal 1).

Sára Jógvansdóttir, borgarstjóri

Vestmanna 03.02.2026

Vestmanna kommuna
Bakkavegur 8 · FO-350 Vestmanna

Tlf. 770 100
vestmanna@vestmanna.fo
www.vestmanna.fo

**Økið á Bakka í Vestmanna**





Tlf. 770 100
vestmanna@vestmanna.fo
www.vestmanna.fo

**Bústaðareindirnar**

Økið á Bakka er góðar 700 fermetrar til støddar, og kostnaðurin er 250 kr/m2.

Tað eru tvær veghæddir á stykkinum. Onnur er niðri við hylin og hin er omanfyri stykkið við Bakkaveg.
Tað eru 27 parkeringsbásar á Bakkavegi, og møguleiki er eisini at gera parkeringsbásar við hylin á niðaru hædd. Har er somuleiðis møguleiki at gera eitt øki til rusk, goymslu v.m.

Kommunan vil, at bústaðareindirnar hava eina so stóra og breiða fjøld av møguligum keyparum/leigarum sum gjørligt, og tá er prísstøðið á bústaðareindunum avgerandi. Tí heitir kommunan á áhugaði um at hava tað í huga, tá uppskotið til eina bústaðarverkætlan verður gjørt.

Tað er frítt hjá áhugaðum at evna uppskot og hugskot um samansetingina av bústaðareindum á økinum, men kommunan ynskir, at bústaðareindirnar skulu fella væl inn økið. Kommunan treytar sær eisini, at atlit verður tikið til fólk við rørslutarni, at grønar/burðardyggar orkuskipanir verða brúktar, og at møguligt verður at seta løðistøðir til el-bilar upp.

**Tilboðini**

Tilboðini skulu verða Vestmanna kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin 16.03.2026 kl. 12:00.

Tilboðini skulu í minsta lagi innihalda eina greiða lýsing av verkætlanini við neyðugum tekningum, eina tíðarætlan og eina kostnaðarmeting.

Innkomnu tilboðini verða viðgjørd av einum arbeiðsbólki, sum ger tilmæli til bygdarráðið at taka støðu til. Í metingini verður serligur dentur lagdur á :

- Metta kostnaðarstøðið fyri eigara/leigara (35%)
- Bústaðarsamansetingin (25%)
- Snið og hvussu væl bústaðareindirnar sum heild fella inn í umhvørvið á Bakka (20%)
- Ein greið tíðarætlan (10%)
- Kostnaðarmeting og fígging (10%)

Um verkætlanin ikki er byrjað tvey ár eftir at semja er gjørd, tilskilar kommunar sær rættin at taka stykkið aftur fyri sama prís, sum tað varð selt fyri.

Vestmanna kommuna
Bakkavegur 8 · FO-350 Vestmanna
Tlf. 770 100
vestmanna@vestmanna.fo
www.vestmanna.fo

Sambært kunngerðini um alment útboð av kommunalari fastogn, stendur kommununi frítt at velja millum innkomnu tilboðini, og eisini einki at velja.

Innkomin tilboð verða viðgjørd í trúnaði, til ognin er seld.

Áhugaði kunnu seta seg í samband við Magnus Müller, tekniskan leiðara, á tlf. 770104 ella Sólvit Nolsø, kommunustjóra, á tlf. 770102.

Vestmanna kommuna
Bakkavegur 8 · FO-350 Vestmanna

Tlf. 770 100
vestmanna@vestmanna.fo
www.vestmanna.fo

**Fylgiskjal 1**

Ásetingar fyri øki A2: Miðstaðarendamál.

1. Øki verður lagt av til miðstaðarbygging, t.e. handlar, skrivstovur, samkomuhøli, heilsu-bótarstovur, gistingarhús, matstovur, smærri handverksfyritøkur, íbúðarbygging o.t. Byggivaldið kann geva loyvi til at innrætta íbúð til virkiseigara ella starvsfólk.

2. Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 0,7.

3. Bygningar kunnu í mesta lagi verða bygdir í 2 hæddum umframt lofti og skulu annars ikki vera hægri enn 9 m til yvirgrindina og 12 m til mønuna mátað frá miðal-jørðildi (í miðal við húsarhornini). Kjallari verður roknaður uppí sum húsahædd, um so er, at loftið er meira enn 1 m yvir hægsta jørðildi við húsahorn. Bert ein kjallari má vera.

4. Frávik kunnu verða gjørd frá ásetingunum í 2. og 3. stk. í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, náttúrliga avmarkað øki. Tó kann nettonýtingarstigið fyri økið sum heild ikki fara upp um 1,0.